# Veðrið

**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Skrið ella stormur av útsynningi, sum út á dagin hækkar til vestan og minkar niður í stívt andøvsgul til hvassan vind. Skýggjað og regn ella ælaveður, partvís sum vátaslettings- ella heglingsælingur. Hitin millum 2 til 7 stig.




**Sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri. Út á dagin lækkar hann í sunnan og veksur upp í strúk í vindi til skrið, og mánanáttina skrið ella stormur av suðri og landsynningi. Skýggjað, men um náttina regn. Hitin millum 2 og 7 stig.




**Mánadagin:**
Upp í skrið av suðri, sum seinni støkkur vesturum til útsynning og minkar vindin til stívt andøvsgul upp í hvassan vind. Skýggjað og regn, men seinni slítur í við ælaveðri. Hitin millum 2 og 7 stig.

**Týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, sum seinni hækkar upp í vestan ella útnyrðing. Fyri tað mesta skýggjað, men av og á regn ella vátaslettingur. Hitin fellur niður móti frostmarkinum.

# Creamy til Føroya

*Hálvføroyski poppbólkurin, sum er blivin eitt veruligt stjørnunavn í Danmark, kemur til Føroya at hava tvær konsertir í næsta mánaði*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tak mest seldu føroysku fløguna í ár, falda talið av seldum eintøkum við eini 150, og tú hevur talið á fløgum, sum Creamy hava selt upp á fýra mánaðir.

Poppduoin, har føroyska Rannvá Joensen er onnur helvtin, hevur tikið øll á bóli við teirra fløgu.

Í heyst lá fløgan hjá teimum í fleiri vikur nummar eitt á almenna danska hitlistanum, og konsertirnar, sum tær báðar genturnar hava hildið kring um í Danmark hava verið sera væl vitjaðar.

Í Føroyum hevur Creamy eisini selt væl, og telist fløgan hjá teimum millum tær best seldu á árinum – heilt frammi í oddanum.

Og nú sleppa føroyingar at uppliva bólkin á palli, tí 19. og 20. februar fara Creamy at spæla í Føroyum.

Tað er kappróðrarfelagið hjá NSÍ, sum hevur fingið avtalu við Creamy um, at tær skulu koma til Føroya.

Enn er ikki fastlagt nær konsertirnar verða, men ætlanin er at hava eina konsert í Runavík, og í samstarvi við Kyndil verður ein konsert hildin í Havn.

**Egið hugskot**
Rannvá Joensen og Rebecca Mathew manna Creamy, og tær báðar 13 ára gomlu genturnar, sum eru vinkonur, fingu sjálvar hugskotiðtil bólkin.

Tær høvdu frammundan sungið saman í gospelbólkinum KOPP, sum hevur verið á vitjan í Føroyum, og tá hesin bólkurin gavst at spæla, fóru Rannvá og Rebecca í holt við teirra egna bólk.

Tær syngja kendar danskar barnasangir, men tónleikurin er forpoppaður og lívligur. Hendan samansetingin hevur rættiliga fingið innivist hjá donskum børnum og ungum, og útgávan hjá Creamy hevur havt við sær, at nú eru onkrir aðrir bólkar farnir at eftirapa teimum.

Men enn stendur Creamy sum bjartasta stjørnan á danska tónleikahimmalinum, og eisini í Føroyum hevur bólkurin vunnið fram við sínum tulkingum av sangum sum *Æblemand*, *Krabbesangen* og *Min kat den danser tango.*







Eitt lágtrýst sunnan fyri Ísland, fer í ein landnyrðing. Eitt annað lágtrýst í ein útsynning úr Íslandi fer í ein landnyrðingeystan. Brúgvaløg haðani koma framvið Føroyum.




Tá brúgvaløgini eru farin framvið liggja oyggjarnar í einum køldum og óstøðugum útsynningsráki. Mánadagin kemur enn eitt brúgvalag við nógvum vindi og regni, seinni ælaveðri, framvið.




**Hitalagið mált frá 06./01. kl 06⁰⁰–07./01. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,2°C**
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**




Avfallið: 19,3 mm – **mált frá 06./01. kl 6⁰⁰–07./01. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í januar: 68,7 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷5 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 10 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannahavn | 4 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | ÷4 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | ÷1 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 8 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | ÷6 |
| New Dehli | 10 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 4 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 34 |

## Vestfalskyrrindi

3. januar: Jørðin næst sólini
4. januar: Mánin longst frá jørðini
6. januar: Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. jan. | 0716 | 1935 | 0616 | 1835 | 0631 | 1850 | 0916 | 2135 | 1016 | 2235 | 0531 | 1750 | 0431 | 1650 | 0731 | 1950 | 0831 | 2050 | 0701 | 1920 | 0816 | 2035 |
| 9. jan. | 0752 | 2009 | 0652 | 1909 | 0707 | 1924 | 0952 | 2209 | 1052 | 2309 | 0607 | 1824 | 0507 | 1724 | 0807 | 2024 | 0907 | 2124 | 0737 | 1954 | 0852 | 2109 |
| 10. jan. | 0827 | 2045 | 0727 | 1945 | 0742 | 2000 | 1027 | 2245 | 1127 | 2345 | 0642 | 1900 | 0542 | 1800 | 0842 | 2100 | 0942 | 2200 | 0812 | 2030 | 0927 | 2145 |
| 11. jan. | 0903 | 2121 | 0803 | 2021 | 0818 | 2036 | 1103 | 2321 | – | 1203 | 0718 | 1936 | 0618 | 1836 | 0918 | 2136 | 1018 | 2236 | 0848 | 2106 | 1003 | 2221 |

Skuldi tú bara tendra kontaktina?



Ring til Leif Mohr tlf. 311220
Stovnað 1935

Antennu-monteringar
Vit avgreiða allar antennu-monteringar



- Komplettar nýmonteringar
- Útskifting og umvæling
- Felags antennuanlegg
Fokus ELEKTRONIK
J. Broncksgøtu 34
Tlf. 311306 - Fax 311306

BETONG SAGING!
Við mest framkomnu útgerð saga vit...
ALLAR SKURÐIR (dýpi 55 cm t.d.: HURÐA-/VINDEYAOP o.a.
EISINI HOL upp til 30 cm/diam, t.d. til rørleiðingar, ventilatión o.a.
Geva fegnir TILBOÐ! – bæði vanl. húsaánarum, virkjum, byggi- og vvs-fyritøkum
FØROYA BETONG SAGING v/ Hjaltur Tausen
Postsmoga 67 · Gerðisvegur 620 Runavík
Tlf. 447543 • Fax 448898
Koma um alt landið!

Brúdarlín v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281



Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast